# Rógva av Eiði til Hósvíkar

**Hóast alt fleiri stórir og flottir luksusbátar eru at síggja til bátatiltøkini, og fólk taka sær av løttum á bátadekkinum, so eru framvegis eisini nøkur fólk, sum heldur vilja taka ár í hond og sjálvi rógva teinin**




Eydna Skaale

Tær hava róð í alt ár og endaðu nummar tvey í stríðnum um FM. Kvinnumanningin á fimmmannafarinum Falki úr Hósvík hevur tó ikki fingið nóg mikið av árabløðrum enn, tí tær hava ætlanir um at rógva av Eiði til Hósvíkar.

## Hugnalig rógving

- Vit eru næstan tann sama manningin, sum vit vóru til FM, men onkur er burturstødd, og tí hava vit fingið nakrar nýggjar við í staðin, greiðir Sóley Samuelsen, bátsformaður umborð á Falki frá.

Falkadamurnar hava róð teinin tvær ferðir áður: einaferð á regatta og einaferð hava tær róð teinin øvugtan veg –út Hósvík og til Eiðis undir eini venjing. Men Sóley slær fast, at tað plagar at vera stak hugnaligt.

- Hetta kann slett ikki samanberast við eina venjing, tí tað er so sera hugnaligt. Nógv róðrarfólk plaga at vera við á regattaini, og her fær man endiliga ein møguleika at práta við tey, man hevur róð ímóti gjøgnum árið, vísir Sóley á.

Hon sigur tó, at tað er undarligt, at so fáir kappróðrarbátar halda seg til at rógva á regattaini.

- Eg veit ikki, hví fleiri ikki eru við. Um tey ikki hætta sær ella hvat. Men eg haldi, at tað avgjørt burdu verið fleiri kappróðrarbátar við, sigur ein avgjørd Sóley og vísir í sama viðfangi á, at tað saktans ber til at verða sleipaður, um man ikki orkar at rógva allan vegin.

## Ikki vera aftastar

Sóley heldur, at kappróðrarbátar væl kunnu fylgjast við hinum bátunum, uttan at leggja alt ov nógv fyri.

- Róðrarbátarnir plaga at fara avstað eitt sindur áðrenn allir hinir bátarnir, so vit eru komin nakað áleiðis, áðrenn hini loysa. Summi halda tað vera fínt at damla allan vegin og at vera langt aftanfyri hinar bátarnar, og í so fall er tað einki problem, tí tað er altíð onkur maskinbátur, ið bíðar, so man kemur ikki at ligga púra einsamallur aftast, greiðir Sóley frá.

Hon slær tó fast, at manningin umborð á Falki ikki dámar at liggja aftast, men vil vera við har tað hendir nakað. Tí eru tær noyddar at taka eitt sindur á.

- Vit hava ein róðursmann, sum hevur róð, so tað ber til hjá okkum at skiftast um at stýra, um vit mugu hvíla okkum eina løtu.

Sóley sigur, at seinast, tær vóru á regatta, blivu tær sleipaðar eitt lítið petti –millum Hvalvík og Streymnes, meðan tær fingu sær ein bita. Men so róðu tær restina sjálvar.

- Tað tekur bara nakrar tímar, og tað er ikki sum ein hørð venjing, so tað orkar man væl. Vit eru jú eisini framvegis í góðum formi, tí tað er so stutt liðið síðani ólavsøkuna, vísir Sóley á.

Hon heldur, at fólk, sum ikki eru í venjing tó saktans kunnu rógva nakað sjálvi, og síðani verða sleipað rest.

- Tað einasta eg vil viðmæla er, at man hevur ein royndan róðursmann, um man velur at rógva um Streymin, sigur Sóley.

## Fáir róðrarbátar

Kvinnurnar umborð á Falki hava ikki vant nakað til Regattaina, tí tær eru sannførdar um, at hendan teinin orkar man væl at rógva. Spurd, um tær orka at vera við í veitsluni í Hósvík, tá tær hava róð hesar 20 kilometrarnar av Eiði til Hósvík, svarar Sóley, at tað er eingin trupulleiki.

- Tað er regatta, og tað er nakað heilt serligt, so tað orka vit væl, sigur hon flennandi.

Umborð á Falki hava tær ikki frætt um serliga nógvar manningar, sum ætla at rógva teinin. Men treyðugt so, onkur annar er eisini.

- Sum vit hava skilt á lagnum, so verður Blikur av Argjum eisini við, men annars hava vit ikki frætt um nakran. Men vónandi verða tað fleiri, tá leygardagurin kemur, sigur Sóley Samuelsen at enda.

eydna@hotmail.com